
sansir.fo

Starvslýsing

# Løgfrøðingar til Innlendismálaráðið

Innlendismálaráðið søkir eftir tveimum løgfrøðingum. Høvuðsuppgávurnar eru ráðgeving, málsviðgerð og lógarsmíð á teimum økjum, ið ráðið umsitur.

Talan er um fakliga spennandi og fjølbroytt størv, har góðir møguleikar eru fyri viðkomandi eftirútbúgving. Eisini verður møguleiki fyri at arbeiða hjá øðrum viðkomandi myndugleikum og stovnum uttanfyri Innlendismálaráðið.

**Førleikar**
Umsøkjarar skulu hava løgfrøðiligt embætisprógv, og vera væl fyri málsliga. Eisini vænta vit, at tú hevur góð samstarvsevni, arbeiðir sjálvstøðugt og miðvíst. Lesandi, ið vænta at verða liðug í næstum, eru vælkomin at søkja.

Løn og setanartreytir vera sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og BLF.

Størvini verða sett skjótast gjørligt. Vilt tú hava meira at vita, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Rúna Joensen, aðalstjóra, á telefon 358080.

Umsóknir við CV, prógvum o.ø. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 10. september 2007 kl. 12:00.

Umsóknir skulu sendast til:
Innlendismálaráðið
Tinganes
Postboks 159
110 Tórshavn

Í Innlendismálaráðnum starvast í løtuni 15 fólk. Innlendismálaráðið umsitur m.a. lógarmál, kommunumál og umhvørvis-, lendis- og náttúrumál.

INNLENDISMÁLARÁÐIÐ
Tel 35 80 80, Faks 35 80 85, Postboks 159
110 Tórshavn imr@imr.fo, www.imr.fo



# Søkir tú nýggjar leiðir?

## Lýsingarstovan Døgg søkir eftir grafikara

Døgg, sum er lýsingarstovan hjá SMS søkir eftir grafikara. Tú skalt helst vera útbúgvin grafikari, ella hava drúgvar royndir innan grafiskt virksemi. Og so slepst ikki uttan um kreativitet. Uppgávurnar eru fjølbroyttar og spennandi, og arbeiðistíðirnar eru góðar. So um tær dámar nýggjar avbjóðingar, í einum nýggjum umhvørvi, so er tað helst tær, vit hava brúk fyri.

Skunda tær og skriva eina umsókn til: SMS, att: Døgg, Box 1059, FO-110 Tórshavn ella send ein teldupost til ann-mari@sms.fo



DØGG
LÝSINGARSTOVAN Í SMS

Døgg